# Quiz

**1** Bókin »Tá deyðin verður avdúkaður« snýr seg um arbeiðið á Landssjúkrahúsinum. *Hvør hevur skrivað bókina?*

**2** Føroyar megnaðu javnleik ímóti Norðurírlandi í fótbóltslandsdysti. *Hvør skoraði føroyska málið í dystinum?*

**3** Sofus Clementsen er farin úr stjórstarva. *Hvar var hann stjóri?*

**4** Fyrrverandi sangari í Uriah Heep hevði farna vikuskiftið konsert í Føroyum. *Hvussu eitur sangarin?*

**5** Tvey feløg hava hetta vikuskiftið møguleikan at gerast føroyameistari í mansfótbólti. *Hvørji eru feløgini?*

**6** Johanna á Tjaldrafløtti og Elisabeth Akursmørk hava givið fjórðu kókibókina í somu røð út. *Hvussu eitur bókarøðin?*

**7** Hondbóltfelag úr Klaksvík roynir seg í bestu mansdeildini. Enn hevur liðið einki stig fingið. *Hvussu eitur felagið?*

**8** *Hvussu eitur forkvinnan í Starvsmannafelagnum?*

**9** Kringvarpið og Mentamálaráðið hava gjørt nýggjan public service sáttmála. *Hvussu eitur stjórin í Kringvarpinum?*

**10** Landsstýriskvinna hóttir við at siga stopp, um almennu lønirnar hækka, og hennara økið ikki fær hægri játtan. *Hvussu eitur landsstýriskvinnan?*

**1-4** Ikki nóg gott
**5-7** Tú fylgir hampuliga væl við
**8-9** Tú fært tað mesta við
**10** Veist tú alt?

**SVAR**

*1. Høgni Mohr, 2. Christian Lamhauge Holst, 3. Í Posta, 4. John Lawton, 5. HB og EB/Streymur, 6. Lætt og leskiligt, 7. Team Klaksvík, 8. Selma Ellingsgaard, 9. Annika Mittún Jacobsen, 10. Rósa Samuelsen*

**10 TING** UM

# JOAN ØRTING

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eydna Skaale



# 5650 kr. fyri Ørting

HON ER **50** ÁRA GOMUL, MEN ER **FRAMVEGIS** TANN **KVINNAN**, **MENN** VILJA **GJALDA** MEST FYRI, FYRI AT FÁA EINA **DATE** VIÐ. HON ER **OPIN** UM **SEX** OG **SAMLÍV** OG VIL FEGIN **LÆRA** ONNUR UM **FANTASTISKA**, EROTISKA **HEIMIN**. HON TOSAR IKKI VIÐ **PÁPA** SÍN, MEN **700** FÓLK VILJA **HVØNN** MÁNAÐ FÁA **HANA** Á TAL

**1** Joan Ørting er fødd 26. mars 1960.

**2** Hon er útbúgvin leiklistaleikstjóri og hevur sett fleiri leikir upp, umframt at undirvíst í drama. Hevur síðani seinni lisið til m.a. sexolog, sum hon er mest kend fyri.

**3** Joan Ørting hevur verið í Føroyum og tosað á einum kvinnukvøldi, har hon gav góð ráð um, hvat kvinnur kunnu gera fyri at gleða makan.

**4** **Joan Ørting hevur ikki tosað við pápa sín í hálvttriðja ár, tí hann ikki tolir hennara opinleika um egið sexlív í miðlunum.**

**5** Hon læs til sexolog í Hollandi, og hon hevur sagt, at tey har skuldu royna alt, tey lærdu um, fyri at tora at bróta egin mørk.

**6** Júst nú er hon fyri hørðum kritikki frá nøkrum sexologum, sum eru útlærdir á hennara egna skúla, tí teir siga, at hon ikki virðir mørkini hjá næmingunum, men noyðir teir at vera við í blygdarskemmandi venjingum.

**7** Joan Ørting hevur eisini roynt seg sum rithøvund við bókunum: »Ta' mig«, »Har du lyst?« og »Hvad vil du ha'?«

**8** Joan Ørting er redaktørur á brævkassanum hjá Ekstra Bladnum, og hon fær umleið 700 brøv um mánaðin frá fólki, ið hava trupuleikar við samlívinum.

**9** 5650 kr var upphæddin, ein maður bjóðaði fyri ein døgverða við Joan Ørting á eini auktión fyri bróstkrabba. 10 kendar kvinnur stillaðu upp, og Joan Ørting vann við hægsta boðnum.

**10** **Joan Ørting hevur sexolog-skúla á Christianshavn, og hon hevur tríggjar flokkar av sexologum árliga.**

## SITAT



Um tú vilt hava ælabogan, mást tú tola regnið.

***Dolly Parton***
*countrysongkvinna*